# Fyrilestur um hjartasjúku

Mikukvøldi 5. septembur klokkan 19.00 skipar Árnafjarðar Róðrarfelag fyri fyrilestri í nýggja róðraneystinum í Árnafirði. Tað er 27 ára gamli Ólavur Thune – ella Ólavur í Streymnesi – ið fer at greiða eitt sindur frá lívi sínum, síðani hann gjørdist álvarsama hjartasjúkur. Ólavur Thune verið í Keypmannahavn síðani mai 2005 og bíða eftir nýggjum hjarta. Lívið, síðani sjúkan varð staðfest, hevur haft sínar upp- og niðurtúrar. Men fyri einum ári síðani fekk hann eitt heartmate, eitt eftirgjørt hjarta, ið heldur honum á lívi. Í sambandi við fyrilesturin koyrir bussur frá bókasavninum í Klaksvík klokkan 18.30.



# Norðoya Javnaðar-felag uppstillingarfund

Annar – og møguliga triði uppstillingarfundur hjá Norðoya Javnaðarfelag verður í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag í Bøgøtu í Klaksvík hósvøldið. Vilhelm Johannesen, sum hevur umboðað Javnaðarflokkin í Norðoyggjum á tingi síðani 1980, stillar ikki uppaftur hesaferð eftir higartil 27 ár á tingi. Fundurin verður hóskvøldið 30. august kl 20 – og felagið heitir á fólk um at møta fjølment!

# Fólk velja frá

**Í sambandi við temadagin um føroyskt gjaldsindeks greiddi stjórin í Intrum Justitia frá, at kanningar vísa, at um 60% av øllum rokningum verða ikki goldnar til tíðina við vilja**

GJALDSMYNSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í sambandi við temadagin á Hafnia fríggjadagin greiddi stjórin í Intrum Justitia, Jákup Jensen, frá teimum royndum, sum fyritøkan higartil hevur gjørt sær á føroyska marknaðinum.

Gongdin hevur verið soleiðis, í góðu gomlu 80-unum ráddi um fyrst og fremst at hava stóran umsetning, og nógv orka varð løgd í at náa løgdu søluætlanini. Útistandandi pengur kom so í aðru røð.

Í 90-unum, tá kreppan av álvara gjørdi um seg, bleiv fokus skift frá sølu til at stýra útistandandi. Ofta var tað eftir paroluni »pengarnar fyrst«.

Nú sær so hinvegin út til, at myndin líkist 80-unum aftur, við nógvari ferð á búskapinum, og ymsum tilboðum fyri at fáa fólk at keypa.

Her er vandin so fyri, vísti Jákup Jensen á, at ansa fyritøkur ikki eftir sínum útistandandi, er vandi í ringasta føri fyri, at tær kunnu fara á heysin. Hetta er serliga galdandi fyri smærri fyritøkur, sum fokusera ov nógv á sølu og ov lítið á útistandandi.

## Missa ikki

Ein ógvuliga stórur vandi í hesum sambandi er, at fyritøkur ofta eru nøgdar við at fáa peningin inn, sjálvt um hetta hendir eitt ár ov seint.

»Vit hava ikki mist nakrar pengar upp á skuldarar, vit fáa allar pengarnar inn, men viðhvørt tekur tað langa tíð«.

Her vísti stjórin á Intrum á, at tá peningurin ikki kemur inn frá kundunum til tíðina, versnar gjaldføri, og so má peningurin – alt annað líka – koma aðrastaðni frá.

Her er vert at hava í huga, at tað førir nógv eyka arbeiði og kostnað við sær, tá neyðugt er at senda rykkjarar og kontoavrit út. Eisini minkar ikki innkomin peningur um møguleikarnar at gera íløgur og menna fyritøkuna, segði Jákup Jensen.

Grundirnar fyri ikki at gjalda til tíðina kunnu vera fleiri. Kundarnir vita kanska, at fyritøkan góðtekur, at farið verður út um freistina, og hartil eru fleiri fyritøkur, ið ikki tilskriva rentu, um goldið verður ov seint.

Alt hetta er við til at vikna um gjaldsevnini hjá fyritøkuni, og kann sum nevnt í ringasta føri senda fyritøkuna á heysin.

Jákup Jensen førdi síðani fram nøkur góð ráð í sambandi við ógoldnar rokningar og vísti á, at Intrum Justitia hevur góðar royndir við at fáa pening inn. Um 80% av øllum peningi, sum fyritøkan krevur inn, verður goldin.



*Jákup Jensen, stjóri á Intrum Jutitia í Føroyum*
*Mynd: Leo Poulsen*

# Føroyar í tyngra endanum

**Gjaldsindeksið, sum Intrum Føroyar hava gjørt, vísir, at føroyingar eru raskastir í Norðanlondum at »gloyma« at gjalda rokningar. Men støðan er kortini frægari enn har, ringast stendur til**

GJALDSMYNSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av føstu táttunum hjá altjóða fyritøkuni Intrum Justitia, er at kortleggja gjaldsmynstur fyri hvørt landið sær, har fyritøkan virkar. Nú er so eisini eitt gjaldsindeks gjørt fyri Føroyar.

Hesi gjaldsindeks verða gjørd á tann hátt, at til ber at samanlíkna hesi við indeksini í hinum Intrumlondunum.

Í Norðanlondum er gjaldsmynstrið samlað á einari leið, tó at Finnland liggur klárt best fyri, meðan Føroyar eru á aftarsta plássi í so máta.

Gjaldsmynstrið í Norðanlondum vísir, at føroyingar eru tann privatkunda bólkur, ið hevur longsta tíð at gjalda sínar rokningar. Meðal fyri Føroyar eru 34,3 dagar. Fyri finskar privatkundar er sama meðaltal 19,6 dagar.

Hetta merkir so, at finnlendingar gjalda sínar rokningar áðrenn vanliga gjaldsfreistin er úti. Føroyingar lata tað heldur fara nakað út um tíðina, áðrenn teir gjalda.

## Sama mynstur

Eisini tá tað kemur til virkiskundar og til almennar kundar, er tendensurin hin sami. Finnland liggur best fyri, meðan Føroyar eisini á hesum økinum eru vánaligastu gjaldararnir.

Nú hoyrir tað sjálvandi eisini við í myndina, at í Finnlandi er traditión fyri, at fyritøkurnar eru ógvuliga skjótar við rykkjarum og løgligari innheintan. Mundandi skjótari enn í hinum Norðanlondunum. Tað gevur sjálvandi kundunum eina rættiliga motivatión at gjalda rættstundis.

Hetta mynstrið merkir so eisini, at Finnland er tað Norðanlandið, har fyritøkurnar missa lutfalsliga minst pening upp á kundar sínar. Bert 0,7% av útistandandi í Finnlandi verður mist, meðan talið í Føroyum og Íslandi er 1,5%. Hetta merkir, at ein fyritøka í Føroyum í meðal hevur tørv á einari meirsølu upp á 15% fyri at bøta um eitt tap av skuldarum upp á 1,5%.

Stefan Schär, sum greiddi frá gjaldsindeksinum, segði, at í teimum tjúgu londunum, sum Intrum virkar í, er eftirstøðan av ógoldnum rokningum í dag so stór sum 1850 milliardir. Eitt tal, sum frá 2003-06 er vaksið við 185 milliardum krónum.

Hann segði, at ringast stendur til í Portugal, meðan Føroyar altso liggja mitt í hesum yvirlitinum av Intrum-londum tilsamans.



*Stefan Schär er úr Sveits, og er serfrøðingur hjá Intrum Justitia í gjaldsindeksi*
*Mynd: Leo Poulsen*